

# Verkfallið fær nú avleiðingar

*– Tað er onki fantilsi á undirvísingini og tað er longu komið so langt, at tað fær avleiðingar fyri próvtøkurnar í summar, sigur skúlastjóri í Klaksvík*

**Læraraverkfallið**

Áki Bertholdsen

– Verkfallið í fólkaskúlanum hevur longu vart so leingi, at tað fer at fáa avleiðingar fyri próvtøkurnar í summar.

Tað ivast Símun Petur Hjelm, skúlastjóri í Klaksvík ikki í.

Hann sigur, at nógvir næmingar hava nú ikki fingið undirvísing í meiri enn ein heilan mánað og tað skal vera løgið, um hetta ikki fer at síggjast aftur í próvtøkuni.

Men hann hugsar ikki bara um, at tað er verkfall.

– Vit skulu eisini minnast til, at hetta er ein tann besta tíðin í øllum skúlaárinum at alt liggur stilt.

– Hesa tíðina uppundir próvtøkuna eru næmingarnir ógvuliga motiveraðir fyri at fáa eitt gott úrslit, og júst hesa tíðina liggur alt lamið.

– Hvørjar avleiðingar hetta fær, tori eg ikki at hugsa um nú.

Hann sigur, at næmingarnir, sum skulu próvtøku, skulu hava lisið eitt ávíst pensum.

– Men tey eru mong, sum ikki eru komin ígjøgnum pensummið enn.

– Og hjá teimum, sum kanska hava lisið alt, verður ongin møguleiki at ganga tilfarið ígjøgnum aftur, sum vanligt er.

Og tað ivast hann ikki í, fer at síggjast aftur í ummælunum, sum næmingarnir fara at fáa í próvtøkunum í summar.

At tað kann fáa avleiðingar fyri teir, sum vilja sleppa inn á hægri lærustovnar er eyðsæð.

Símun Petur Hjelm sigur, at verkfallið hevur longu havt tað beinleiðis avleiðing, at várroyndin, sum skuldi vera fyri eini góðari viku síðani, mátti avlýsast.

–Síðani koma páskini og so eigur próvtøkan at byrjað......

### Onki fantilsi á

Símun Petur Hjelm er skúlastjóri á Ósaskúlanum í Klaksvík og hann er hart raktur av verkfallinum.

– Av teimum 30 lærarurum á skúlanum eru 11 í verkfalli.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu hart teir ymsu flokkarnir eru raktir.

– Vit hava tveir 10. flokkar. Annar fær næstan onga undirvísing, men hin fær næstan alla undirvísingina.

Men Símun Petur Hjelm sigur, at tað ringasta er, at teir næmingarnir, sum eiga at fáa undirvísing, eru nú eisini miðvíst farnir at halda seg burtur úr skúlanum.

– Tað merkir, at í mongum flokkum, har tað eru 20-22 børn, eru bara 1-2 í skúla.

–Sostatt er onki fantilsi á undirvísingini tí tá ið so fá børn eru í skúla, kann tað ikki blíva til annað enn fjas, sigur Símun Petur Hjelm.

– Í løtuni er undirvísingin bara eitt heiti.

– Støðan er nú so vánalig, at tað bleiv ikki verri, um skúlin so stongdi, sigur skúlastjórin.

Hann sigur, at støðan er við at blíva ótolandi eisini í nógvar aðrar mátar.

– Lærararnir gera bara tað, sum teir hava tænastuskyldu til at gera.

– Hjá okkum er tað ringasta, at handkløð, viskistykki o.a., sum vit skúla brúka í heimkunnleika, verða ikki vaskað, so tað er ein spurningur, nær tann undirvísingin eisini má halda uppat.

### Mugu koma víðari

Skúlastjórin sigur, at einasti máti at koma víðari, er at Fíggjarmálastýrið, Undirvísingar og Mentamálastýrið og Lærarafelagið seta seg saman at viðgerða støðuna.

– Tað nyttar ikki at siga, at sáttmálasamráðingarnar og eyka arbeiðið, sum er álagt lærarunum í nýggju fólkaskúlanum eru hvør sítt mál, tí tað eru tey ikki og tí mugu allir tríggir partarnir seta seg saman, sigur Símun Petur Hjelm.

Hann tekur annars fult undir við Lærarafelagnum í hesi ósemjuni.

– Nýggja fólkaskúlalógin áleggur lærarunum og skúlaleiðslum nógv eyka arbeiði og tað má sjálvsagt viðgerðast í sambandi við sáttmálasamráðingarnar, sigur Símun Petur Hjelm.

# 25 bjóða seg fram á Tvøroyri

*Har verður bæði tivoli, undirhald og nógv, góð tilboð*

Áki Bertholdsen

Aftur í ár verður stór páskasølustevna í ítróttarhøllini í Trongisvági við tivoli, undirhaldi og nógvum tilboðum.

25 handlar og fyritøkur úr øllum landinum fara at vísa, hvat tey hava at bjóða. Av teimum er gott helvtin úr Suðuroynni og tann minna helvtin eru aðrastaðni frá.

Og úrvalið er fjølbroytt, líka frá bilum og bilaútgerð, um teldur og teleútgerð til klæðir og blómur.

Og skuldi tað blivið svangligt, fæst eisini okkurt gott undir tonnina, bæði av onkrum søtum og onkrum, sum kanska mettar eitt sindur betri.

Tað eru Tvøroyrar Bóltfelag, Svimjifelagið og Foðbiar Sóknar Róðrarfelag, sum skipa fyri páskasølustevnuni.

### Tivoli og undirhald

Á stevnuni verður eisini bæði tivoli og ymiskt annað undirhald.

Tivoli stendur Lions Klubburin í Suðuroynni fyri og allur peningurin, sum kemur inn, verður óskerdur latin til ymisk vælgerðandi endamál.

Undirhald verður allar dagarnar. Tá ið stevnan letur upp, hóasdagin. 13. apríl klokkan 16. fer Kristian Blak at spæla klaver og kirkjukórið Ljómur úr Vági fer at syngja.

Fríggjadagin og leygardagin fara gentur úr Porkeri at danska Creamy og leygardagin fara Rakul og Magni at syngja.

Fríggjadagin verður mótasýning og sunnukvøldið, tá ið stevnan endar, verður eisini gallashow við mótasýning.

Sunnudagin fer eisini Shalder Geo við feðgunum Kristiani og Michael Blak og Høgna Klakkstein at spæla.

Annars er stevnan opin frá hósdegnum 13. apríl til sunnukvøldið 16. apríl og hon er opin út á kvøldið.

Annars verða tíðirnar lýstar betur seinni.

Sjálv setanin verður hósdagin kl. 18, og tað verður Dan Nielsen, býráðsformaður sum fer at seta stevnuna.

# Fleiri børn komin aftur í skúla

*Framhaldsdeildin hevur verið næstan tóm í seinastuni, men nú er frægari*

**Læraraverkfallið**

Áki Bertholdsen

Í gjár var ikki so tómligt á Venjingarskúlanum í Havn, sum tað hevur verið.

Katrin Ellingsgaard, varaskúlastjóri, sigur, at eisini á Venjingarskúlanum hevur framhaldsdeildin verið næstan tóm í seinastuni, men at fleiri næmingar nú eru nú komnir aftur í skúla hesa vikuna.

Hon heldur, at partvís eru næmingarnir farnir at møðast av støðini. Men partvís hevur hon eisini varhugan av, at tað eru foreldur, sum hava havt álvarsprát við børnini og fingið tey at skilt týdningin av at tey fáa undirvísing teir tímarnar, sum ikki eru verkfalsraktir.

Venjingarskúlin er annars hart raktir, tí har eru 17 av 41 lærarum í verkfalli.

Tað ber í sær, at fleiri flokkar als onga undirvísing fáa ímeðan aðrir fáa nógv skerda undirvísing.

Varastjórin sigur, at hon dugir ikki at smeta um, hvussu leingi hetta kann halda fram, uttan at tað fær álvarsligar avleiðingar fyri próvtøkuna.

Hon sigur, at várroyndin hjá allari framhaldsdeildini, uttan áttanda, var, áðrenn verkfallið var, men royndina hjá áttanda máttu tey avlýsa.

Tíggjundi flokkur er í starvsvenjing í løtuni, men nakrir av teimum næmingunum eru eisini raktir av verkfallinum.

Teir sleppa nevniliga ikki í starvsvenjing, tí fleiri arbeiðsgevarar hava tikið áheitanina frá sjeymanna bólkinum hjá fakfeløgunum til eftirtektar um, ikki at taka næmingar í starvsvenjing, so leingi verkfallið er

Katrin Ellingsgaard heldur, at vit eiga ikki at gloyma tey smáu børnini í hesum sambandinum.

– Nógv verður tosað um undirvísingin í framhaldsdeildini.

– Men vit skulu heldur ikki gloyma, at tey smáu hava heldur ikki fingið undirvísing nú í meiri enn ein mánað, og tað er eitt álvarsligt bakkast fyri tey, tí tíðin, sum er mist, fáast ikki aftur.

Hon sigur, at ein avleiðing av, at lærarnir bara gera sína tænastuskyldu, er, at tað ikki altíð verður keypt tilfar og annað, sum skúlin verður í uppisetri fyri.

Eisini teldurúmið er rakt, tí tær teldurnar, sum verða í óstandi, tær standa, til alt hetta er av.

So tað er eisini ein spurningur um tíð, áðrenn onki er at hava skúla til, av tí alt tilfar og alt annað er uppi, hóast tað verður nakað enn, áðrenn tað verður so galið á Venjingarskúlanum.



# Próvtøkurnar í vanda

**Læraraverkfallið**

*Føroyski fólkaskúlin hevur nú í 4 vikur verið merktur av arbeiðssteðginum hjá sáttmálasettu lærarunum. Nú gera fleiri vart við, at próvtøkurnar eru í vanda*

Dagfinn Olsen

Næmingar í eldru flokkunum eru komnir í klemmu, tí próvtøkan nærkast, og enn røkist einki fyri, at arbeiðssteðgurin í fólkaskúlanum fær ein enda.

Selmar Jacobsen, skúlastjóri, sigur, at vanliga verður byrjað at fyrireika seg til próvtøkur í mars. Skrivligu próvtøkurnar eru longu í maj.

Selmar Jacobsen sigur, at tær skrivligu próvtøkurnar kunnu fara fram, uttan at lærarar eru til staðar, men sjálvsagt verða ongar fyrireikingar í flokkunum.

Um lærararnir ikki eru aftur í skúlanum í juni, so verða ongar próvtøkur, tí til munnligu próvtøkurnar mugu lærarar vera til staðar.

Hóast Selmar Jacobsen ikki hevur framhaldsdeild í Sankta Frans Skúla, so metir hann, at næmingarnir longu hava mist nógv.

Sankta Frans Skúli er meint raktur. Yngstu flokkarnir og teir elstu eru slopnir væl, men til dømis eru 2., 3. og 4 flokkar, ið bert hava 2 tímar um vikuna.



*Selmar Jacobsen, skúlastjóri*

Umleið helvtin av lærarunum í Sankta Frans Skúla eru sáttmálasettir, so Selmar Jacobsen metir, at tað kanska bert er Hoyvíkar Skúli, ið er harðari raktur.



*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Øssur í Lítluvík

*Í dag letur Øssur Johannesen upp listaframsýning*

Í dag klokkan letur listamaðurin Øssur Johannesen upp listaframsýning í Smiðuni í Lítluvík. Talan er um menniskjalýsingar og landsløg.

Opið er frá í dag, 6. apríl til sunnudagin, og til ber at støkka inn á gólvið frá klokkan 16 til 20.

*- do -*

# Anarki ræður

*Í dag hittast skúlanevndir úr øllum landinum til fundar í Havn. Orsøkin er arbeiðssteðgurin í føroyska fólkaskúlanum. Formaðurin í skúlaráðnum í Havn heldur, at støðan nú er ótolandi og at anarki ræður*

Dagfinn Olsen

Eftir ætlan skuldu flestu skúlanevndir í landinum hittast í gjár, men fyri at fáa umboð úr Suðuroynni við, verður fundurin í dag, hósdag.

Formaðurin í Skúlaráðnum í Havn, Egon Øregaard, sigur, at talan er um flestu skúlanevndir í landinum. Í hvussu er fyri størru plássini, ið hava framhaldsdeild og har skúlarnir eru hart raktir av arbeiðssteðginum.

Talan verður um at tosa saman um trupulleikarnar. Møguliga fara nevndarumboðini at bjóða seg fram, um tey kunnu nýtast til okkurt, ið kann gagna gongdini, ella um tey kunnu koma við hugskotum um, hvussu gongd fæst á aftur samráðingarnar.

### Anarki

Egon Øregaard sigur, at ikki er væl vorðið í skúlunum og at talan nú er um anarki.

Hann metir, at øll eru rakt av arbeiðssteðginum. Foreldur eru í dupurhuga, tí eldru næmingarnir eru ikki í skúla, nú próvtøkur nærkast og so eru sjálvsagt eisini trupulleikar av yngru børnunum, ið ganga fyri vág og vind.

Hann heldur, at nú má henda støðan halda uppat.



*Egon Øregaard, formaður í skúlaráðnum í Havn*

## Foreldur mótmæla

*Skipað verður fyri landsumfatandi innsavning av undirskriftum*

**Foreldur at næmingum í 9. flokki í Kommunuskúlanum í Havn høvdu týskvøldið fund um støðuna í skúlanum, nú arbeiðssteðgur er.**

**Ein av niðurstøðunum á fundinum var, at støðan er ótolandi og skipað verður tí fyri landsumfatandi innsavning av undirsktiftum at mótmæla støðuni.**

**Henda fer fram á skúlunum kring landið og foreldur fáa nærri at vita um hetta.**

*- do -*

# Ógreitt við tiltøkum

*Joan Ziskason dugir enn ikki at siga, nær fakfeløgini fara at seta stuðulstiltøk í verk*

Dagfinn Olsen

Føroya Lærarafelag hevur nú verið í arbeiðssteðgi í 4 vikur. Í síðstu viku boðaðu hini fakfeløgii, umboðað av 7 mannabólkinum, frá, at tey fóru ikki at standa og eygleiða á síðulinjuni longi afturat. Hetta gjørdu tey greitt á fundi við Høgna Hoydal í Tinganesi.

Joan Ziskason frá 7 mannabólkinum dugir enn ikki at siga, nær tiltøk kunnu væntast frá hinum fakfeløgunum.

Einki røkist tó fyri, at tað verður hesa vikuna, men enn er als einki avgjørt hesum viðvíkjandi, sigur Joan Ziskason.

7 mannabólkurin hevur ikki verið saman, síðani fundin í Tinganesi fyri viku síðani.



*Joan Ziskason*

# Bræv frá myndugleikunum

Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum hevur sent fólkaskúlum og skúlanevndum í Føroyum bræv.

Sagt verður, at skúlanevndin er myndugleiki á staðnum og eigur saman við skúlaleiðsluni at bera so í bandi, at undirvísingin verður ó-rógvað sum minst, nú verkfall er.

Víst verður á, at arbeiðsumstøðurnar hjá tænastusettum lærarum eru truplar. Undirvísingar- og mentamálastýrið hevur við atliti at verkfallinum dagliga umrøtt umstøðurnar og ásannar, at hóast ótrygg viðurskifti undir verkfallinum, so hevur Undirvísingar- og mentamálastýrið skyldu at vísa á, at undirvísing, sum ikki er verkfallsrakt, verður framd.

Vísandi til hetta verður skúlaleiðslan biðin um at skipa gerandisdag næminganna so, at teir so vítt gjørligt ikki hava millumtímar og at umsjón í mesta mun er við yngru næmingunum.

*- do -*

# Heita á skúlanevndina

Lærarar í Tvøroyrar skúla høvdu mánakvøldið fund, har teir røddu um støðuna, skúlin er í í løtuni.

Skriv er sent skúlanevndini, løgmanni og landstýrismonnunum Høgna Hoydal og Karsten Hansen, ið umsita ávíkavist skúlamál og fíggjarmál.

Lærararnir heita staðiliga á skúlanevndina um at gera vart við seg á røttum stað, so gongd kemur á aftur samráðingarnar. Sagt verður, at ørkymlandi støðan merkist skilliga á bæði næmingum og lærarum.

Lærarar vísa til ansingarskylduna og spyrja, hvør hevur ábyrgdina av næmingunum teir tímarnar, ið ikki verða lisnir, nú verkfall er.

*- do -*


DANSISKEIÐ VIÐ ANNU KIRSTIN



Dansifrøi stílar fyri almennum dansiskeiði í eingilskum dansi vikuskiftið 7.-8. apríl 2000.
Dansað verður í auluni í Hoydølum.

Skeiðið er fyri øll dansiáhugað -børn, ungdóm, vaksin, pør og støk, øll kunnu verða við. Undirvíst verður í Foxtrot, Quickstep, Rock´n roll, valsi og øðrum løttum. Liðini verða bólkað soleiðis:

| Fríggjad. 7/4 | Leygard. 8/4 |
|---|---|
| kl. 16.00-17.15 Børn 10-14 ár | kl. 10.00-11.15 Børn 10-14 ár |
| kl. 17.30-19.00 Ung | kl. 14.00-15.30 Nýbyrjarar |
| kl. 19.15-20.45 Nýbyrjarar | kl. 15.30-17.30 Vandir dansarar |
| kl. 21.00-23.00 Vandir dansarar* | kl. 17.45-19.30 Ung |

*(fólk sum hava luttikið í standard-dansiskeiði áður og vilja læra meira).

Hugnakvøld verður frá kl. 21.00.
Kostnaður fyri børn og ung kr. 100,-. Vaksin kr. 150,-
Tilmelding á tel. 316063, 316682, 310634, 317243 og 314486

Dansifrøi

Sosialurin - 311820